# Heimleys í Føroyum virðiligar umstøður

**Tey heimleysu í Føroyum eru nú løgd fyri Løgtingið og gongst sum Hans Pauli Strøm vil, skal tað enda við, at Løgtingið samtykkir, at tey skulu hava betri umstøður**



*Tað eru eini 35 heimleys í Føroyum og tey skulu nú hava virðiligari umstøður, sigur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður*

HEIMLEYS
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skulu tey heimleysu í Føroyum hava betri umstøður.

Tað heldur Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almannamálum,

Hann hevur nú lagt uppskot fyri Løgtingið, har hann vil hava tingið at samtykkja, at tey heimleysu skulu hava betri umstøður.

Tí vil hann hava Løgtingið at samstykkja, at eitt miðvíst arbeiði skal fara í gongd fyri at bøta um korini hjá teimum heimleysu.

Sostatt vil landsstýrismaðurin hava Løgtingið at samtykkja, at bústaðir verða útvegaðir til tey heimleysu.

– Her skal talan vera um bústaðir til tann bólkin av heimleysum, sum er ringast fyri og har krøvini til búfólkini verða avmarkað. Tað merkir, at talan skal vera um bústaðir í einum vardum umhvørvi sum tey kunnu kalla teirra heim

Samstundis vil hann hava Løgtingið at samtykkja, at nakrir bústaðir eisini verða útvegaðir til tann bólkin av heimleysum, sum hevur brúk fyri resosialiserandi stuðli í styttri tíð.

Tey heimleysu skulu eisini hava tilboð um persónligar samrøður, virknisskapandi tilboð, búvenjing og onnur sosialt og persónliga mennandi tilboð

Harafturat er ætlanin at bøta um møguleikarnar hjá heimleysum at hava eitt herbergi at fara um næturnar.

Hans Pauli Strøm hevur eisini í hyggju at samskipa tilboðini hjá teimum sjálvbodnu felagsskapunum, landinum og kommununum fyri at fáa ein samanhang í arbeiðið.

Men av tí sama er eisini neyðugt, at aðrir stovnar, sum veita hjálp, eitt nú Almannastovan og Heimaróktin, eru við í hesum samstarvi.

Men hann ætlar eisini, at ábyrgdin fyri at útvega heimleysum bútilboð, verður lagt undir kommunnar.

Hóast Kommunurnar fáa ábyrgdina fyri at hava tilboð at vísa heimleysum á, er tað ætlanin, at landið og kommunurnar skulu býta fíggjarligu ábyrgdina




### 35 heimleys

Hans Pauli Strøm sigur, at tað eru eini 35 heimleys í Føroyum í dag. Av hesum búgva 15 fyribils í búfelagsskapum hjá Bláa Krossi og Frelsunarherinum. Hini 20 hava onki fast tilhaldsstað.

Hann metir, at fyrst árið verður neyðugt at játta einar 3,6 milliónir fyri at fáa gongd á hjálpina til tey heimleysu.

Eftir galdandi skipan letur landskassin 1,15 millión í stuðuli stuðul til sjálvbodnu felagsskapirnar, og 600.000 verða latnar frá Tórshavnar Býráði, so tilsamans er stuðulin 1,75 millión.

– Tekur Løgtingið undir við ætlanini, fer landsstýrið at leggja uppskot fyri Løgtingið eftir Ólavsøku um at broyta forsorgarlógina og at seta í hana, hvørji serlig tilboð tey heimleysu skulu hava og har er samstundis har greitt ábyrgdarbýti millum land og kommunur verður staðfest, sigur Hans Pauli Strøm.




**Elektrikkari ella líknandi søkist til SEV**

Ert tú elektrikkari, ella hevur aðra viðkomandi útbúgving, hevur tú møguleika at fáa eitt sera spennandi, og til tíðir, krevjandi arbeiði í eini fyritøku í stórari menning innan elteknisk øki.

Tú verður partur av einum toymi, sum hevur ábyrgd av eltekniska útbúnaðinum á elverkum og koblingsstøðum kring alt landið.

Góð samstarvsevnir, og evnir at málbera teg í skrift og talu á føroyskum, donskum og enskum geva fyrimun

Sum umsøkjari til starvið hevur tú eisini fyrimun, um tú:
- Kennir til PLC, montering av hesum, og stýringar sum heild.
- Kennir til instrumentering og mátiteknikk.
- Hevur eina hándverksliga grundútbúgving innan el.
- Hevur evnir og áræði til at arbeiða sjálvstøðugt, og taka røttu avgerðirnar.

**Vit kunnu bjóða tær:**
- Eitt sera fjølbroytt arbeiði, har tú til tíðir kemur at arbeiða sjálvstøðugt
- Eitt arbeiði sum tú sjálvur er við at tilrættaleggja.
- Møguleika fyri bæði persónligari og fakligari menning.
- Eitt gott arbeiðsumhvørvi, har samstarv og smidleiki er eitt "must".

**Lønin:**
Lønin verður sambært seravtalu tengd at sáttmálanum millum Føroya Arbeiðsgevarafelag/Meistarafelagið og Handverkarafeløgini.

**Elfelagið SEV:**
Felagið, tú fer at arbeiða hjá, er interkommunala Elfelagið SEV, sum tekur sær av at streymveita allar Føroyar frá og við elframleiðsluni og til endaliga brúkaran. SEV hevur uml. 150 fólk í starvi, og á deildini har tú fer at arbeiða, eru frammanundan 3 verkfrøðingar og 2 elmontørar.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Finn Jakobsen, deildarstjóra ella Terja Nielsen, verkfrøðing á telefon 346800.

Umsóknir skulu saman við avritum av prógvum og møguligum ummælum sendast Elfelagnum SEV, postrúm 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi týsdagin, tann 4. apríl 2006.

Elfelagið SEV

Sosialurin 341800

**Bátur til sølu**



**Sierra 30 fót til sølu. Byggiár 2000. 1 ára gamal Volvo Penta 300 HK við DPH drevi, við dupultari stálskrúvu. Gongur 30 míl. Báturin hevur alskyns hentleikar:**

- Bóvskrúvu
- Radara 16 fjórðingar
- GPS kortplottara
- Sjálvstýrara
- Oljufýr við klokku (Webasto)
- El-ovn til varma
- El-ovn kombineraður til spritt. 2 plátur
- Mikrobylgjuovn
- Køliskáp við frystara 12 Volt – 220 Volt
- Trykkvatnsbeholdara heitt og kalt vatn
- WC við el-tøming til septiktanga
- Brúsa til heitt og kalt vatn
- 3 stk el-lensipumpur
- El hydraulic flaprar
- El- automatic stabilisatorar
- 2 stks landstreymsløðarar
- Bjargingarbát til 6 persónar
- Gummibátur til 4 pers. Við 10 HK Honda 4-takt páhangara (óbrúktur)
- VHF Telefon
- 22' litsjónvarp 12 Volt – 220 Volt
- Flatskerm PVD 12 Volt
- Radio við fløguspælara
- El-ankar við fjarstýring – 50m keta
- 2 stk brandalarmar
- Presenning til flybridge
- Presenning til afturdekk
- Presenning runt um rútarnar og glashurð - óbrúkt
- Baðistigi til baðidekk
- Fjarstýrdur ljóskastari á targaboyla
- Nýtt avtakiligt borð til bakdekkið
- Mátta til dúrkið á bakdekkinum – óbrúkt.

**Báturin, sum er sera væl røktur, verður seldur um hóskandi boð fæst.**

**Sp/f Norðbil**
**Telefonnr. 31 37 07**